# Glitnir.org hackað av illum muslimum

**HAKKING**

Heimasíðan hjá hugnaliga spælistaðnum á Skálatrøð, Glitni www.glitnir.org varð fríggjanáttina hackað av einum í kallar seg Hitler Jeddah. Hann sigur frá, at hetta er ein áheitan til danir, um at vísa virðing fyri øllum profetum.

Áheitanin er vegna allar muslimar í heiminum, sigur Hitler Jeddah.Eisini er ein mynd av einum pakkað av donskum smørið, nógv av skriftini er á arabiskum, og hvat her stendur, eru vit ikki før fyri at týða, men á enskum stendur:

FOR ALL MUSLIMS AROUND THE WORLD

»Denmark please respect all prophets of God« Allah

Like: Prophet Noah, Prophet Abraham, Prophet Moses, Prophet Jesus & Prophet Muhammed.

Hetta er enn eitt tekin um, at í umheiminum verða føroyingar sæddir, sum verandi danir. Tí er hóttanin, ið Danmark er fyri, líka nógv galdandi fyri okkum.

**Umsett til føroyskt:**

Linja 1.: »Guds profetur er undantikin ..« - (linjan niðanfyri) »Gud vælsigni hann og friður veri við honum«

So kemur Saudiarabiska flaggið, við trúarjáttaninum í kalligrafiskrift á grønum dúki.

Niðanfyri enska tekstin: »Vit gera tað, vit siga ---> Hitler Jeddah«

Í lýsingini við lurpaksmørpakkanum: »Boykottan av donskum vørum..

Danmark spottar enntá profetin... meðan fólk eta og drekka, sum um einki var hent

Um mann boykokttaði tað (teirra drykki- og matvørur), so hevði ein brotsmaður ikki havt dirvið (at tekna tekningarnar), og seyðir og neyt høvdu útdoyð

Danmarks avísir spotta profetin..,. boykotta allar hennara vørur«

Fyrsta linjan, skal skiljast í samanhanginum við, at mann heldur, at mann í prinisppinum kann skemta við øllum, men tó er profeturin undantikin í hesum. Og tá stríðið tekur seg upp við vesturlondini, so er profeturin undir øllum umstøðum, nakað sum ikki skal verða gjørt til láturs.

Versið í lýsingini við smørpakkanum, er helst partur av eini yrking av einum ella øðrum slag. Hon hevur rím, møguliga er tað ein sangur???

Men nakað soleiðis, sum omanfyri í gásareygum, hevði tað ljóðað á føroyskum.




*Heimasíðan hjá Glitni, sum leygadagin var »álopin« av illum muslimum*


**Skrivstovulærlingur**



Søkt verður eftir skrivstovulærlingi at byrja skjótast tilber.

Áhugað kunnu senda umsókn saman við møguligum prógvum og møguligum viðmælum til:

**P/F Articon**
**Postboks 3109**
**110 Tórshavn**

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at tosa við Niclas Joensen, tel 350 700 ella 216169.

ARTICON

Sosialurin 341800






**FAMILJUPAKKI**

Pakkið bilin heima í túninum, koyrið umborð og hugnið tykkum á ferðini. Soleiðis koma tit frísk og vælúthvíld til dyrnar á tykkara Danland frítíðardepli – fáar kilometrar frá Hanstholm, har Norrøna leggur at. Læättari gerst tað ikki. Danland hevur alt, sum krevst fyri at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman.

**2 vaksin og 2 børn v. bili til Danland úr**

**6.570,-**

Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4 koyggjukamari v. wc/bað innv. Hartil uppihald í 2 verilsisibúð á Danland í Blokhus ella Hirtshals. Eykakostnaður: Oljuavgjald kr. 120,- fyri hvønn ferðandi. Avgreiðslugjald kr. 120,- fyri bileggingina. Fráferðir 06.04, 13.04 og 20.04.

**UNDIRHALD UMBORÐ**

**Búktalarin Absalon Árgarð við Nikláa og hinum dukkudreingjunum undirhalda børnum og barnsligum sálum:**
Tórshavn-Hanstholm 06.04
Hanstholm-Tórshavn 15.04

**Angela og Hannibal:**
Hanstholm-Tórshavn 08.04
Tórshavn-Hanstholm 13.04

**Kjølar:** Føroyar-Danmark 06.04-10.04

**Jens Marni Hansen, Ólavur Øster og Jóhannus á Rógvu Joensen:**
Føroyar-Danmark 13.04.-17.04

REPROZ